Álit

í

løgtingsmáli nr. 119/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan (Skeið í fyrstuhjálp)

Sirið Stenberg og Hervør Pálsdóttir, tingmenn, hava vegna Tjóðveldi lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 16. mars 2021 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. og 7. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Lærarafelagið, Kommunufelagið, Reyða Kross, Betri Trygging, Trygd og landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, saman við Undirvísingarstýrinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Djóni Nolsøe Joensen, Jóhannis Joensen, Beinta Løwe Jacobsen og Bjarni Kárason Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Fyrstahjálp kann verða avgerandi í støðum, tá fólk eru komin illa fyri. Tí er umráðandi, at so nógv sum til ber eru før fyri at veita fyrstuhjálp.

Undir hoyringini hava hoyringarpartar verið positivir í mun til, at fyrstahjálp skal inn í fólkaskúlan.

Ein møguleiki er, at fólkaskúlalærarar fáa skeið í at undirvísa í fyrstuhjálp, ein annar at t.d. Reyði Krossur ella onnur koma inn og undirvísa næmingum í fyrstuhjálp. Men ein spurningur um, hvør skal undirvísa, eigur ikki at verða ein forðing fyri, at næmingar í fólkaskúlanum læra fyrstuhjálp. Tað, sum er avgerandi, er, at næmingar fáa undirvísing í hesum.

Týdningarmikið er, at 12 tímar verða játtaðir afturat til fyrstuhjálparskeið, sum skulu gerast í aldursbólkum í samanhangandi undirvísing í t.d. 3 dagar. Tímar mugu ikki takast frá verandi ítrótta- og svimjilærugrein. Svimjiførleikarnir eru viknaðir hjá næmingunum og handaligu lærugreinatímarnir gerast færri. Tí eigur henda broyting at takast við í endurskoðanini av lærugreinabýtinum, sum verður skipað í næstum.

Umráðandi er, at avvarðandi partar, tað eru Mentamálaráðið, lærarar, umboð fyri næmingar/foreldur verða tikin við, tá undirvísingin í fyrstuhjálp skal leggjast til rættis.

Undir hoyringunum er spurningurin vorðin reistur, hví man í uppskotinum vil hava skeið í fyrstuhjálp sett inn sum eitt krav í § 8, stk. 1 í løgtingslógini um fólkaskúlan, tí fyrstahjálp longu er partur av námsætlanini fyri ítrótt, har hon tó kundi verið lýst nágreiniligari, enn hon er í dag. Tí hevði møguliga verið nøktandi, um verandi orðingar í námsætlanini bert vórðu gjørdar neyvari. Meirilutin tekur undir við, at verandi orðingar í námsætlanini áttu at verið dagførdar.

Eisini eigur fyrstuhjálparútbúgvingin at takast heim til Føroya, har Setrið og læraraútbúgvingin verður partur av hesum, so vit fáa útbúgvið instruktørar í Føroyum. Eitt skeið í Danmark kostar

uml. 40.000 kr. Læraraskúlaútbúgvingin verður endurskoðað í ár, og tí eigur hesin parturin eisini at takast við í hesi tilgongdini.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Heðin Zachariassen og Edva Jacobsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í dag er ymiskt, hvussu skeið í fyrstuhjálp verða skipað í skúlum. Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at landsstýrismaðurin hevur biðið um eitt yvirlit yvir, hvussu hetta er skipað í fólkaskúlum í dag.

Landsstýrismaðurin greiddi frá, at í løtuni er man í gongd við eina endurskoðan av lærugreinabýtinum í fólkaskúlanum. Í hesum arbeiði verður eisini undirvísing í fyrstuhjálp viðgjørd, og hvussu tað frameftir verður ein partur av undirvísingini.

Somuleiðis verður læraraútbúgvingin endurskoðað, har hetta evnið eisini verður tikið upp.

Minnilutin metir, at tað er best, at fyrstahjálpin verður tikin við í arbeiðið hjá landsstýrismanninum, nú tá endurskoðanin fer fram, og ikki fyri seg.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 16. apríl 2021

Djóni Nolsøe Joensen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Jóhannis Joensen
Beinta Løwe Jacobsen	Bjarni Kárason Petersen	Heðin Zachariasen
	Edva Jacobsen	